# Roynir at bjarga tí síðsta æðublikinum



*Æðublikurin er heldur stinnari í dag*
*Mynd: Niels Uni Dam*

**Ein flokkur við 20-25 æðum hevur hildið til í Vágsbotni, men í oljudálkingini í seinastu viku doyðu næstan allar æðurnar, bert ein æðublikur er eftir á lívi. Í einum húsum í grannalagnum, royna eini hjún at halda lív í honum**

DÁLKING
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

"Í nøkur ár hevur ein flokkur við 20-25 æðum hildið til á sjónum við Müllersbrúgv. Fólkið í grannalagnum og tey, sum arbeiða á Skipasmiðjuni, hava givið æðunum breyð. Tær vóru vorðnar heilt tamar, hóast tær í kappróðrartíðini kundu vera eitt sindur styggari", greiðir Absalon Hansen frá, meðan hann pettar eitt sindur av einum pylsubreyði niður á flisarnar, framman fyri neyðarsliga æðublikinum: "Í gjárkvøldið tá eg kom oman at geva teimum breyð, var einans hesin blikurin eftir, hann kom til mín, meira deyður enn livandi, so eg tók hann heim við mær." Absalon Hansen og konan hava bæði hundar og kettu, og fleiri ferðir hava tey tikið sær av æðum, ið eru komnar illa fyri av nógvu dálkingini í Vágsbotni.

Kona Absalon lenar seg út gjøgnum gluggan á hugnaligu gróthúsunum og sigur frá, at í fjør høvdu tey eina æðu inni í 14 dagar, áðrenn hon var nóg birg at verða sloppin út aftur. "Hon kom sjálv niðan til garðin hjá okkum, eg veit ikki, um djór kenna fólk aftur, men tað virkaði, sum um hon vildi hava hjálp", greiðir hon frá og leggur stillisliga afturat: "Fólk siga kanska, at tað er bara ein æða, men tað er tað ikki fyri øll, t.d. koma tey gomlu av Ellisheiminum oman og seta seg á ein bonk, tá er tað hugnaligt, at æður svimja í sjónum"

Absalon væntar, at hetta er síðsti æðublikurin í flokkinum, ið fyri fáum døgum síðan taldi 20-25 æður,"Hinar eru nokk deyðar", sigur hann og greiður frá, at hann veit um onkran, sum hevur kipt onkra æðu seinastu dagarnar, tí hendan var so illa fyri, eins og Absalon sjálvur hevur gjørt fleiri ferðir áður. Tá hann tók hendan æðublikin upp í gjár var skilið eisini so mikið ringt, at hann væntaði, at hann fór at verða noyddur at kippa hann, men í morgun er hann heldur birgari. Absalon tinnur hundasjampo við vatni, og brúkar hetta til at vaska æðunum við. Trupulleikin er, at tá æðurnar verða oljudálkaðar missa tær førleikan at torna, tí doyggja tær av kulda, greiðir Absalon frá. Bæði hann og konan eru sera ónøgd við skilið við allari hesi dálkingini.

"Eg ringdi til politiið, tá eg sá dálkingina handan morgunin(mikumorgunin bløm.), men tey søgdu, at tey høvdu fingið boð kvøldið fyri, men høvdu staðfest, at her var bert talan um fiskafeitt. Men tað er týðiligt, at hetta ikki bert er fiskafeitt.", sigur Absalon Hansen. Hetta kundi sløkkiliðið eisini staðfesta, tá tey tóku 1.800 litrar av olju upp í Vágsbotni seinni á degnum. Absalon Hansen er sera harmur um hetta, tí løgreglan hevði møguleika at steðga dálkingini longu kvøldið fyri, og sostatt minka munandi um skaðiligu árinini.



*Absalon Hansen hevur givið æðublikinum breyð og vaska honum við tintum hundasjampo*
*Mynd: Niels Uni Dam*


Hálvársroknskapurin 2006

*í 1.000 kr.*

| Rakstrarroknskapur 1. hálvár | 2006 | 2005 |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur o.a. | 149.822 | 147.487 |
| Rentuútreiðslur o.a. | 37.230 | 31.175 |
| **Rentuinntøkur netto** | **112.592** | **116.312** |
| Vinningsbýti av partabrøvum og øðrum kapitalpørtum | 1.318 | 431 |
| Tænastu- og provisiónsinntøkur | 15.508 | 10.076 |
| Tænastu- og provisiónsútreiðslur | 138 | 112 |
| **Rentu- og tænastuinntøkur netto** | **129.280** | **126.707** |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra | -13.991 | 15.396 |
| Aðrar vanligar inntøkur | -1.604 | 378 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **113.685** | **142.481** |
| Útreiðslur til starvsfólk og umsiting | 70.886 | 66.951 |
| Avskrivingar av óítøkiligum og ítøkiligum ognum | 3.119 | 3.865 |
| Aðrar vanligar útreiðslur | 14 | 0 |
| Tap og burturleggingar fyri skuldarar (netto) | -1.446 | 1.048 |
| Úrslit av kapitaláhugamálum | 4.410 | 2.908 |
| **Úrslit av vanligum rakstri fyri skatt** | **45.521** | **73.525** |
| Skattur | 7.831 | 14.705 |
| **Hálvársúrslit** | **37.690** | **58.820** |
| **Fíggjarstøða 30. juni** | | |
| **Ogn:** | | |
| Kassapeningur og áogn í lánistovnum o.a. | 307.823 | 470.448 |
| Útlán | 4.671.686 | 3.508.413 |
| Láns-, partabrøv o.a. | 1.167.897 | 1.818.395 |
| Kapitalpartar í leysknýttum og tilknýttum feløgum | 131.481 | 128.581 |
| Ítøkiligar ognir | 62.657 | 62.208 |
| Aðrar ognir og tíðaravmarkingar | 28.169 | 37.192 |
| **Ogn tilsamans** | **6.369.713** | **6.025.237** |
| **Skuld:** | | |
| Skuld til lánistovnar | 290.498 | 77.696 |
| Innlán | 4.872.456 | 4.266.050 |
| Onnur skuld og tíðaravmarkingar | 79.659 | 61.627 |
| Avsetingar til skyldur | 3.300 | 3.842 |
| Úrslit higartil í ár | 37.690 | 58.820 |
| Eginpeningur | 1.086.110 | 1.557.202 |
| **Skuld tilsamans** | **6.369.713** | **6.025.237** |
| Ábyrgdir | 270.784 | 144.298 |
| Aðrar skyldur | 0 | 0 |
| **Tøl, sum ikki eru tikin við í javnan, tilsamans** | **270.784** | **144.298** |

FØROYA BANKI